## VEÐRIÐ




**Veðrið mikudagin**
Landnyrðingur, 2 m/s og hitin millum 10 og 12 stig. Fyrrapartin og seinnapartin skýggjað, um kvøldið regn




**Veðrið hósdagin**
Norðan og útnyrðingur, 3 m/s. Fyrrapartin og seinnapartin skýggjað, men turt allan dagin. Um kvøldið klárar hann í við sólarglottum. Hitin um 13 stig




**Veðrið fríggjadagin**
Útsynningur, 6 m/s og regn av og á. Hitin um 11 stig

**Veðrið um vikuskiftið**
Landsynningur og útsynningur, uml. 10 m/s. Regn av og á. Hitin um 12 stig.

# Jón Brian aftur í útvarpið

**Jón Brian Hvidtfeldt, sum hevur verið tíðindamaður á Rás2, er í dag settur sum tíðindaleiðari í útvarpinum**




*Jón Brian Hvidtfeldt*

**STARVSSETAN**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Jón Brian Hvidtfeldt kom frá útvarpinum til Rás2, tá Miðlahúsið yvirtók rásina.

Jón Brian er viðurkendur sum sera dugnaligur journalistur og hevur verið valdur til Ársins journalist.

Jón Brian Hvidtfeldt er ein av seks nýggjum deildarleiðarum, sum settir eru í Kringvarpinum í sambandi við bygnaðarbroytingar, sum fara fram í almenna Kringvarpinum.

Jón Brian Hvidtfeldt er 31 ára gamal og útbúgvin journalistur.

Barbara Samuelsen er sett í starv sum leiðari á dokumentardeildini. Barbara hevur seinastu tíðina starvast sum blaðstjóri á Kvinnu.

Herluf Sørensen, sum er gamal í garði í Kringvarpinum, er settur sum leiðari á programdeildini.

Og eisini eitt annað vælkent kringvarpsnavn, Hans Andor Johannesen, er settur sum leiðari. Hann skal leiða tekniska partin hjá Kringvarpinum.

Allan Dalsgarð, sum í løtuni starvast hjá Sendistovuni, verður leiðari fyri miðladeildini. Og endaliga verður Sanna Hansen leiðari fyri starvsfólka- og umsitingardeildina. Hon hevur starvast í Eik Banka undan hesum.

Nýggi bygnaðurin í Kringvarpinum ber við sær, at tey seks verða leiðarar fyri bæði út- og sjónvarpið hjá Kringvarpinum.



*Herluf Sørensen*



*Barbara Samuelsen*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 27 |
| Kiev | 31 |
| Bukarest | -- |
| Paris | 20 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 35 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 37 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 17 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 998 hPa við vesturstrond Noregs ferðast spakuliga í ein landnyrðing.



Eitt annað lágtrýst, 992 hPa yvir Bretsku oyggjunum ferðast í ein landnyrðing, og liggur í morgin yvir sunnara part av Noregi

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/08 kl. 06[00] – 12/08 06[00]. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 11/08 kl. 06[00] – 12/08 06[00].
Avfallið higartil í august: 2 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 10. august | Mánin longst frá jørðini |
| 16. august | Fullmáni |
| 24. august | Seinna kvarter |
| 26. august | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. aug. | 9:05 | 21:25 | 8:05 | 20:25 | 8:20 | 20:40 | 11:05 | 23:25 | - | 12:05 | 7:20 | 19:40 | 6:20 | 18:40 | 9:20 | 21:40 | 10:20 | 22:40 | 8:50 | 21:10 | 10:05 | 22:25 |
| 20. aug. | 9:46 | 22:07 | 8:46 | 21:07 | 9:01 | 21:22 | 11:46 | - | 0:25 | 12:46 | 8:01 | 20:22 | 7:01 | 19:22 | 10:01 | 22:22 | 11:01 | 23:22 | 9:31 | 21:52 | 10:46 | 23:07 |
| 21. aug. | 10:28 | 22:51 | 9:28 | 21:51 | 9:43 | 22:06 | 0:07 | 12:28 | 1:07 | 13:28 | 8:43 | 21:06 | 7:43 | 20:06 | 10:43 | 23:06 | 11:43 | - | 10:13 | 22:36 | 11:28 | 23:51 |
| 22. aug. | 11:14 | 23:39 | 10:14 | 22:39 | 10:29 | 22:54 | 0:51 | 13:14 | 1:51 | 14:14 | 9:29 | 21:54 | 8:29 | 20:54 | 11:29 | 23:54 | 0:06 | 12:29 | 10:59 | 23:24 | - | 12:14 |
| 23. aug. | - | 12:04 | 11:04 | 23:45 | 11:19 | - | 1:39 | 14:04 | 2:39 | 15:04 | 10:19 | 23:00 | 9:19 | 22:00 | - | 12:19 | 0:54 | 13:19 | 11:49 | - | 0:39 | 13:04 |

Lesið
Sosialin